## DAGSINS MEINING

# Tørvur á nútímansgerð

Tað er synd at siga, at almeningurin nakrantíð hevur verið væl kunnaður um viðurskiftini innanfelags í SEV. SEV er ein interkommunalur felagsskapur, sum hevur røtur aftur í fimitárini, tá Føroyar vóru eitt heilt annað samfelag við einum heilt øðrvísi undirstøðukervi enn í dag. Tá SEV kom, var hetta eitt ómetaligt framstig fyri allar partar av samfelagnum t.v.s. vinnulív, kommunur og vanliga borgarin. Bygnaðurin var skipaður, sum kommunalpolitikkarar hugsaðu tá. Øll skuldu hava nakað at siga, og valdið varð býtt millum eitt umboðsráð, eina nevnd og ein stjóra. SEV gjørdist ein sera sterkur kommunalur stovnur og ein stovnur, sum mangir kommunalpolitikkarar vóur stoltir av. SEV fekk góðar sømdir frá landi og stati. Frá løgtinginum fekk SEV einarætt til at troyta vantorkuna í øllum føroyskum áum og umvegis donsku stjórnina fekk SEV lut í sera lagaligum láni burturav Marshallhjálpini.

Farið varð av øllum alvi undir at útbyggja vatnorkuna uttan nøkur sum helst fyrilit fyri nátturu og landslagi. Nógv tjak stóðst av hesum í fírsunum, tá stórur partur av áunum í Eysturoy hvurvu niður í vatntunnlarnar hjá SEV. Men SEV helt rimmarfast við sín rætt at troyta vatnið uttan at skulu noyðast at taka estetisk ella økologisk fyrilit. Spurningurin er, um ikki tíðin er farin frá hesi monopolstøðuni, sum interkommunali felagsskapuirn hevur havt síðan fimtiárini. Samfelagið er vorðið so samansett og torgreitt, at tað er ein spurningur, um tað í longdini ber til at hava ein risastóran orkuframleiðara, ið kann liva og láta, sum honum lystir. Eigur ikki øll útbygging at vera planløgd og samskipa út frá samfelagsligum meginreglum? Eiga vit nú ikki at takað fyrilit fyri náttúra og heilsubøtandi økjum. Kann almenningurin t.d. góðtaka, at SEV ein dag fer eftir Fjallavatni, ið man vera náttúrvakrasta øki í landinum?

Tað er nógv, sum bendir á, at tíðin er farin frá tí innanfelags bygnaði, sum SEV hevur og frá tí serstøðu, sum interkommunali felagsskapurin hevur í føroyska samfelagnum. Skipanin er alt ov afturlatin og tíðin rópar eftir gjøgnumskygni. Spyrjast má nú, um tað er skilagott, at orkupolitikkurin er eitt kommunalt mál? Er ikki tíðin komin, at tað almenna t.v.s. Vinnumálaráðið og løgtingið skipa fyri og taka ábyrgdina av øllum orkupolitikki, eisini streymveiting? Kommunurnar kunnu væl saktans vera við. Hetta hevði merkt, at spurningurin um streymveiting í framtíðini verður loystur sum ein partur av orkupolitikkinum hjá tí almenna? Ófriðurin í SEV kundi bent á, at okkurt er galið. Tað tykist, sum sjálvur bygnaðurin eggjar til maktstríð. Hetta er í sjálvum sær sera óheppið. Tað er tí avgerandi neyðugt at nútímansgera bygnaðin. Men hetta er ikki nóg mikið. Hyggjast má eisini eftir støðuni hjá SEV sum heild í dagsins samfelagið. Tað tykist, sum tíðin er farin frá øllum monopolum. Hetta má eisini vera galdandi fyri SEV, so her sleppur tað samlaða landsstýri neyvan undan at taka um notuleggin innan alt ov leingi. Her er tørvur á nútímansgerð. At enda eigur almenningurin at fáa eina frágreiðing um ta ósemju, sum í løtuni leikar á í felagsskapinum.

**Sosialurin**

# Frels okkum frá okkum frá okkum sjálvum!

**HØGNI HOYDAL**
Formaður
Tjóðveldisflokkurin



**Eg havi trupult við at skilja, hví danska stjórnin ikki boðar frá, at Irak-kríggið var eitt mistak, og at danska stjórnin tí ikki longur ynskir at luttaka í sokallaðu samgonguni, sum hevur hersett Irak. Danski staturin er farin inn í eitt kríggj, sum hevur kostað tíggjutúsundavís av sivilum mannalívum á einum beinleiðis skeivum grundarlagi og við einum sera lítlum meiriluta. Tann trupulleikan meti eg, at danska Fólkatingið og danska fólkaræðið eigur at viðgera, segði Høgni Hoydal m. a. í røðu á fólkatingi tá framhaldandi donsu hernaðarluttøkuna í krígnum í Irak var til viðgerðar**

Frels os fra os selv, eller frels os fra følgerne af vore egne gerninger. Det må vel være overskriften over denne debat og hele debatten omkring den danske deltagelse i Irak-krigen. Jeg er fortsat fuld af forundring over, at man stadig kan have en debat her i Folketinget om danske militære styrkers tilstedeværelse i Irak i det 21. århundrede. Jeg er også overrasket over, at man fortsat kalder det for et dansk bidrag til en multinational sikringsstyrke i Irak. Det mener jeg er en meget pæn omskrivning af virkeligheden.

Jeg er til stadighed meget harmfuld over, at man i et samfund, som kalder sig demokratisk, kan beslutte at gå i krig på et spinkelt flertal i Folketinget og på et direkte forkert grundlag og dermed drage mennesker, der er imod krigen med i det inferno af drab på civile, væbnet magtkamp, skabelsen af nye fjender, økonomisk udbytning og menneskelig fornedrelse og afmagt, som altid følger med i en krig. Det er jo selve krigens væsen.

I Den Nordatlantiske Gruppe er vi klart imod Irak-krigen og også imod en fortsat besættelse af Irak. Både det færøske parlament, Lagtinget, og det grønlandske parlament, Landstinget, har stemt imod Irak-krigen, før den startede, men vi er på trods af det draget med i krigen, på grund af at vi jo ikke endnu har taget vores fulde demokratiske rettigheder til også at bestemme vores egen udenrigs– og sikkerhedspolitik.

Argumenterne i de to parlamenter var klare. En krig mod Irak ville være at straffe civilbefolkningen fra en diktators ugerninger; det ville splitte hele det internationale samfund; det ville skabe et ragnarok og føde terrorister i hver en kælder, hvor der ikke før havde været terrorister; det ville skabe nye fjendebilleder og nye blodige kulturelle, religiøse og økonomiske konflikter i hele regionen, men som også ville påvirke hele den globale stabilitet.

I dag ved vi, at alle disse argumenter og advarsler var rigtige. Danmark har ved at følge den amerikanske enegang været med til som en anden doktor Frankenstein til at skabe sit eget monster, som man nu skal bruge dage og uger og midler til at bekæmpe. Og man gør sig til talsmand for, at nu er alle dem, der var imod krigen, ikke med på at bekæmpe det monster, som man selv har skabt. Det synes jeg er en meget irriterende argumentation. Det er næsten argumentationen fra George Bush med, at hvis I ikke er med os, så er I imod os, og at dem, der ikke støtter krigen, støtter Saddam Hussein. Det synes jeg er et argument, der burde helt udelades af debatten.

Jeg har svært ved at forstå, hvorfor man ikke fra dansk side erklærer, at krigen var en fejl, og erklærer, at man ikke er med i den såkaldte koalition af villige til at besætte Irak. Derudfra kunne man så fra dansk side selvfølgelig tilbyde al den hjælp af civil, humanitær, økonomisk og social karakter, som er nødvendig for at prøve at komme ud af moradset i Irak.

Men det, der undrer mig allermest, er det demokratiske problem, at man i Danmark anno – ja, det var så i 2003, men stadig i dag, i 2006, godtager, at man kan gå i krig på så spinkelt et grundlag. I et retssamfund kræver en lille foreteelse jo sigtelse, og den kræver undersøgelser og beviser og domstole. Men her kan man gå i krig, som alle ved vil koste titusindvis, måske hundredtusindvis af

# Jólagávur frá Tvøroyrar Býráð

**FINNLEIF GUTTESEN**
Tvøroyri



**Sum einasta kommuna í landinum, ið ikki rindar avdrøg upp á 72 milliónir í skuld og hækkar skattaprosentið til 23,5, kunnu borgararnir í kommununi vænta sær meira enn eina plastiktasku, og býráðslimir ein klæðning, í jólagávum komandi árini, sigur Finnleif Guttesen, fyrrverandi borgarstjóri á Tvøroyri**

Eftir lánsavtaluni, ið var galdandi til november 2005, hevði skuldin hjá kommununi verið áleið 64 milliónir krónur við árslok. Nú verður upplýst, at skuldin er 72 milliónir krónur, so her er okkurt spinnandi galið, tí kommunan hevur ikki loyvi til at lána og harvið hækka sína skuld, og tað sær eisini út til, at býráðið bert ætlar at gjalda rentur av skuldini tey komandi 5 árini. Eftir 10 árum er ætlanin, at skuldin skal verða komin niður á eina álíkning, umleið 44 milliónir krónur.

Býráðslimir hava við hesari avtalu, tveitt ábyrgd frá sær og latið upp til okkara børn og abbabørn, um at gjalda gildið.

Borgarstjórin tosar nógv fyri, at Suðuroy skal verða ein kommuna, og um tað er fyri at fáa hinar kommunurnar í oynni at átaka sær skuld hjá Tvøroyrar kommunu skal verða ósagt, men tað má verða ein herskin biti hjá hinum kommununum at slúka.

Men sjálvsagt kunnu hinar kommunurnar slúka hendan kamel, um Tvøroyrar kommunu, ið fær 10 milliónir meira um árið til nýtslu, brúkar hesar milliónir fyri alla oynna. Til dømis ellisheim í Vági, reint vatn, reinar kloakkir o. a. á Tvøroyri, næmingaheim, svimjihøll og fótbóltsvøll í Hovi.

Tíðin fer at vísa suðuroyingum, um býráðslimir á Tvøroyri eru so mikið at sær komnir, at teir megna og hava dirvi til, at síggja út um bøgarðarnar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddː**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.